VEÐRIÐ



Fríggjadagin
Lot til andøvsgul av eystri, 3-8 m/s. Turt og sólin sær. Hitin millum 5 og 8 stig. Um náttina niður í 3 til 6 stig.



Leygardagin
Lot til andøvsgul av eystri, 3-8 m/s. Turt og sólin sær. Hitin millum 5 og 8 stig. Um náttina niður í 3 til 6 stig.



Sunnudagin
Lot til andøvsgul av suðuri og landssynningi, 3-8 m/s. Sum frálíður snarar ættin í útsynning og tað verður andøvsgul til strúk í vindi, 8-13 m/s. Skýggjað og ælaveður. Hitin millum 5 og 8 stig.

Arsenal Føroyar í Bowlinghøllini

Seinnapartin leygardagin hevur fjepparafelagið, Arsenal Føroyar, sín árliga aðalfund í Bowlinghøllini í Havn. Aftaná verður hugt at FA Cup-hálvfinaluni ímóti Chelsea

FJEPPARAR
Tíðindaskriv
post@sosialurin.fo

Samstundis sum fótbóltskappingin í Onglandi er farin at halla, fer føroyska Arsenal-fjepparafelagið, Arsenal Føroyar, at hava ársaðalfund. Hann verður í Bowlinghøllini á Hálsi í Havn nú leygardagin klokkan 15, har alt tað vanliga er á skránni.

Ársfrágreiðing og roknskapur verða løgd fram, innkomin mál verða viðgjørd, og somuleiðis skulu veljast nevndarlimir, tiltakslimir og grannskoðari. Sum skilst er lagt upp til nakrar broytingar í nevndini, so okkurt nýtt navn verður óivað at síggja í leiðslu felagsins.

At aðalfundurin er lagdur í júst Bowlinghøllini, er heldur ikki av tilvild, tí ætlanin er at halda fram við hugnaligu samveruni eftir sjálvan fundin. Klokkan 17.15 verður hálvfinala í FA Cup-kappingini blást í gongd, og har er Arsenal annað liðið á vøllinum.

Talan er um dyst á hægsta stigi, tí mótstøðuliðið á Emirates Stadium er eitt annað London-felag, Chelsea. Bæði Arsenal og Chelsea hava í vikuni spælt seg í hálvfinalurnar í Champions League, og kunnu sostatt møtast aftur í størstu europeisku finaluni.

Arsenal Føroyar hevur nú tvey ár á baki, og talan hevur verið um tvey virkin ár, har fleiri ferðir er skipað fyri væleydnaðum og vælvitjaðum tiltøkum í sambandi við ymsar dystir hjá Arsenal.

Fjepparafelagið hevur sína egnu heimasíðu, arsenal.fo, har vaksandi limaskarin og onnur kunnu fylgja bæði við felagnum og við Arsenal.



Arsenal Føroyar hevur nú tvey ár á baki sum alment fjepparafelag

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-12
Nuuk	-3
Qaqortoq	0
Ammassalik	-
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	0
Seyðisfjørður	0
Tórshavn	4
Lerwick	7
Aberdeen	9
London	10
Tromsø	--
Bergen	3
Oslo	--
Stokkhólm	2
Keypmannah.	4
Helsinki	-3
Moskva	1
Berlin	5
Warzawa	2
Kiev	4
Bukarest	8
Paris	9
Madrid	20
Róm	14
Malorca	16
Athen	12
Malta	14
Tunis	18
Beijing	12
New Dehli	27
Bangkok	33
Jakarta	31
Sydney	--
New York	6
Miami	23
Los Angeles	16
Meksikobýur	24
Panama	--
La Paz	5
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	26

LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



Veðurlagið
Eitt hátrýst um 1025 hPa yvir Norskahavinum og Íslandi stendur í stað

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 13/04 kl. 06⁰⁰ – 14/04 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,4°
Minsti hiti máldur í apríl: -8,7° - Mesti hiti máldur í apríl: 12,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 13/04 kl. 06⁰⁰ – 14/04 06⁰⁰.
Avfallið higartil í apríl: 0 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

VESTFALLSKYRRINDI

9. apríl	Fullmáni
16. apríl	Mánin longst frá jørðini
17. apríl	Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
16. apríl	00:18	12:42	11:42	-	11:57	-	02:18	14:42	03:18	15:42	10:57	23:42	09:57	22:42	00:33	12:57	01:33	13:57	00:03	12:27	01:18	13:42
17. apríl	01:27	13:52	00:27	12:52	00:42	13:07	03:27	15:52	04:27	16:52	-	12:07	11:07	23:42	01:42	14:07	02:42	15:07	01:12	13:37	02:27	14:52
18. apríl	02:27	15:00	01:27	14:00	01:42	14:15	04:27	17:00	05:27	18:00	00:42	13:15	-	12:15	02:42	15:15	03:42	16:15	02:12	14:45	03:27	16:00
19. apríl	03:34	15:39	02:34	14:39	02:49	14:54	05:34	17:39	06:34	18:39	01:49	13:54	00:49	12:54	03:49	15:54	04:49	16:54	03:19	15:24	04:34	16:39
20. apríl	03:58	16:17	02:58	15:17	03:13	15:32	05:58	18:17	06:58	19:17	02:13	14:32	01:13	13:32	04:13	16:32	05:13	17:32	03:43	16:02	04:58	17:17